## EG MEINI TAÐ

# Eingin tíð til børnini og tey ungu



*Elin Heinesen skrivar:*

Tað eru óhugnalig tøl, sum í løtuni eru at síggja í fjølmiðlunum, sum viðvíkja børnum og ungum fólki. Fyri 20 árum síðan vóru tað í vesturheiminum umleið 8 til 10 prosent av børnunum, sum høvdu sokallaðar socio-emotionellar trupulleikar í størri ella minni mun. Í dag liggur hetta tal á umleið 20-25 prosentum! Fleiri og fleiri børn og ung verða send til serundirvísing og til viðgerð hjá psykologum og psykiatarum.

WHO og Barnagrunnurin hjá ST hava gjørt eina frágreiðing, har tey vísa á, at hvørt ár doyggja 1,5 milliónir ung av misbrúki, avleiðingum av barnsburði, sjálvmorði og skaðum av vanlukkum ella harðskapi. Tað er eisini millum tey ungu, at 50 prosent av nýggjum HIV-smittaðum finnast. Talið av børnum og ungum við depressiónum, og av børnum og ungum, sum gera enda á sær sjálvum, er eisini nógv vaksið seinastu 20 árini. Depressión er nú fjórða største sjúkuorsøk millum ung, og fær væntandi annað plássið longu áðrenn ár 2002 er av. Psykologar og psykiatarar siga seg drukna í áheitanum um hjálp og í arbeiðsuppgávum, sum teir ongan livandi tjans hava til at fullføra. Í Danmark er bíðitíðin til at sleppa framat hja einum barnapsykiatara hálvtannað ár!

Ofta verður orsøkin til hesi ótespiligu tøl førd aftur til tað trýstið serliga nógvar barnafamiljur liva undir í mun til vantandi tíð og vaksandi krøv um materiellar ágoðar. Foreldrini arbeiða so nógv fyri at fáa ráð til alt, sum ein vanlig familja í dag sigst at tørva, at tey hava ikki tíð at taka sær av børnunum, og teir sperdu stovnarnir –barnagarðar, skúlar, frítíðarheim –hava heldur ikki umstøður og ráð til at geva børnunum tað, sum teimum tørvar allarmest - tíð til nærveru og umsorgan. Hetta hevur við sær, at fleiri og fleiri børn útvikla strongd, angist, órógv og trupulleikar við at eta. Ein kann bara gita sær til árinið, hetta hevur á heilsuna hjá børnunum framyvir, tá tey gerast vaksin.

Frágreiðingin hjá WHO og ST-barnagrunninum vísir á, at trupulleikarnir hanga saman við teim sera stóru og skjótu broytingunum, sum fara fram samfelagsliga, sosialt, tøknifrøðiligt og mentanarliga í hesi tíðini. Hetta samanhildið við alla ta tíðina børnini eru latin til sín sjálvs saman við sjónvørpum við satellittmóttakarum og við teldum við atgongd til alnótina, sum aftur í sær sjálvum gevur atgongd til hvat sum helst, sum ofta ikki er ætlað eygunum á børnum. Ongantíð áður í søguni hava børn og ung havt so lætta atgongd til pornografiskt tilfar. Og kanningar vísa, at tey ungu sjálvi, sum jú hava eitt náttúrligt forvitni, leita sær hetta tilfarið fram, og at nógv av teimum eisini lata seg ávirka av tí og spæla sær við tankan um at føra tað út í lívið, sum tey síggja og uppliva í sjónvarpinum og á alnótini. Soleiðis er tað eitt kent fyrbrigdi her niðri í Danmark og í øðrum evropeiskum londum, at fleiri og fleiri ung fáa eitt avskeplað forhold til náttúrligan seksualitet, t.d. eru tað tíverri fleiri og fleiri ung, sum neyðtaka onnur ung –og ofta í størri bólkum, har summir av brotsmonnunum eru heilt niður í 12 ára aldur!

Hetta er altsamalt serstakliga óhugnaligt, og spurningurin er, hvat vit skulu gera við tað. Hvussu kunnu vit venda hesi skeivu gongd? Vit kunnu jú ikki bara leypa av tokinum í ferðini ella steðga menningini við tøknini - t.d. sløkkja øll sjónvørp og kopla alnótina frá...! Tøknifrøðiliga menningin gongur sína gongd uttan náði. Til ber heldur ikki at siga, at nú skulu konufólkini aftur til kjøtgrýturnar harheima at ansa børnunum, so tey eru undir betri eftirliti –í fyrsta lagi tí tær allarflestu kvinnurnar als ongan hug hava til at venda aftur til fortíðarinnar lágstatus og til at seta seg sjálvar uttanfyri ávirkan, har samfelagsligar avgerðir verða tiknar. Í øðrum lagi tí tær allarflestu barnafamiljurnar kunnu ikki klára seg uttan tvær inntøkur.

Nei, einki av kynunum eigur at standa við sviðusoð orsakað av hesum. Bæði kyn mugu býta ábyrgdina og uppgávuna millum sín. Tí tað er eingin ivi um, at vit verða noydd til at taka okkum betur av okkara børnum og ungu í framtíðini, skulu vit venda gongdini. Her má politiskur vilji og visiónir til, har umhugsað verður, hvussu vit kunnu innrætta samfelagið soleiðis, at pláss verður fyri at geva ta tíð og ta umsorgan børnunum og teim ungu tørvar, so vit lofta teimum, áðrenn tey verða fangað av skeivu gongdini. Og tað gera vit ikki við at stinga høvdið niður í sandin sum strutsurin og lata sum um hesi fyribrigdini ikki eru til, men við at tosa opið um, hvørjir trupulleikar kunnu standast av menningini. Vit mugu geva okkum tíð til at vísa børnunum, hvar mørkini ganga etiskt og moralskt — og soleiðis vísa teimum, at vit taka okkum av teimum og teirra trupulleikum! At tey ikki standa einsamøll við øllum.

Vikuskifti
Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

## GAMLAR HAVNARMYNDIR

*Lagt til rættis: Birgar Johannessen*

# Varðagøta 1953



Hildið verður, at hendan myndin er tikin í 1953 ella har á leið. Hon er tikin oman eftir Varðagøtu. Vinstrumegin síggjast m. a. húsini, har Gunnar Stockholm hevði handil. Høgrumegin sæst KFUM o. s. fr. Høgrumegin sæst eisini oman í Villumsgøtu og húsini har um leiðir. Niðast sæst portrið, sum gekk frá Varðagøtu og inn til katolikkaprestin.

Myndaeigari: Kári Arge

# Tórshavnar Skipasmiðja um krígstíð



Hendan myndin er helst tikin í tíðarskeiðnum 1940-45.

Á Vestaruvág sæst ein slupp, sum hevur málað føroyska flaggið á síðuna og navnið FØROYAR er eisini málað á síðuna. Hetta varð gjørt undir seinna heimsbardaga, og tí verður hildið, at myndin er tikin um hetta mundið.

Myndaeigari: Kári Arge



# Bókadeildin metsølu

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur rættiliga vind í seglunum í løtuni.
- Allar bøkurnar seldu væl í fjør, einstakar útgávur seldu framúr væl, og limatalið í bókaklubbunum er eisini økt, sigur Niels Jákup Thomsen, leiðari á Bókadeild Føroya Lærarafelags



*– Fáa høvundar og listafólk umstøður at arbeiða, ivist eg ikki í, at nógvar og góðar barnabøkur verða skrivaðar, sigur Niels Jákup Thomsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

MENTAN

*Turið Kjølbro*

Leiðarin á Bókadeild Føroya Lærarafelags kann ikki annað enn fegnast, nú hann situr yvir tølunum fyri árið í fjør. Allar bøkurnar, forlagið gav út í fjør, seldu væl, bæði barnabøkurnar, sum eru ætlaðar bókaklubbanum og hinar útgávurnar. Ein seldi so mikið væl, at sløk hálv mió. krónur var eftir til forlagið, tá ið avtornaði.

- Bókaklubbin hevur viðgongd, talið á limum veksur støðugt, og bøkurnar, sum koma í bókaklubban, verða eisini væl seldar í handlunum. Tí verða nógvar av samprentsbókunum útseldar. Vit kunnu tí ikki siga annað enn, at stórur áhugi er fyri føroyskum barnabókum.

- Tað kann væl hugsast, at góða búskaparliga støðan í landinum er ein orsøk, men eg rokni eisini við, at ein orsøk er, at fleiri foreldur keypa børnum sínum bøkur og at bøkurnar, vit geva út, eru góðar bøkur, sigur Niels Jákup Thomsen.

### Bíligar

Talið á bókum, Bókadeildin gevur út, liggur um 40 um árið, har 30 eru smábarnabøkur, barnabøkur og ungdómsbøkur, sum koma í bókalubban. Hinar eru aðrar útgávur, í fjør eitt nú ein fløga og ein kókibók. Bókadeildin fær á hvørjum ári umleið 1 mió. krónur úr landskassanum til sítt virksemi og umsetningurin hesi nógvu seinastu árini hevur ligið um 4,3 mió. krónur.

Longu sum pinkubarn kanst tú gerast limur í bókaklubbanum, og støðugt fleiri foreldur velja at tekna børn síni sum lim áðrenn tey gerast ársgomul.

- Í fleiri ár hevur gongdin verið tann, at tá ið børnini gerast 9-12 ára gomul, falla tey frá. Tá eru so nógv onnur tilboð, men fleiri foreldur halda fram at keypa bøkurnar við vón um, at børnini lesa bøkurnar, tá ið tey byrja at lesa sjálv. Nøkur melda seg úr eina tíð, kanska tí, at tey halda, at tey eiga nóg mikið av bókum, men tá ið so onkur serlig bók kemur út, melda tey seg uppíaftur.

Bøkurnar, sum ikki koma í bókaklubban, kunnu bókaklubbalimir keypa fyri bókaklubbaprís, sum er væl bíligari enn bókin annars kostar. Bøkurnar, Bókadeildin gevur út, eru ikki dýrar og tað er tilvitað frá forlagnum.

- Vit mugu ansa eftir, at bókin ikki verður so dýr, at fólk aftra seg at keypa hana, og verður hon ikki keypt, er einki vunnið. Tí halda vit prísin á einum rímiligum støði. Myndabøkur, sum vit selja fyri umleið 90 kr., kosta væl meiri í til dømis Danmark, sigur Niels Jákup Thomsen.

### Gott úrval

Fleiri bøkur, sum forlagið gav út í fjør, skaraðu framúr, hvat sølu viðvíkir. Bøkurnar um Harry Potter, har tann fyrsta er nærum uppseld, kókibókin og Dagbókin hjá Onnur Frank.

- Góður matur úr sjónum varð prentað í 5000 eintøkum, men varð útseld eftir stuttari tíð. Síðani er bókin prentað aftur. Tað er ógvuliga dýrt og orkukrevjandi at geva eina slíka bók út, men tað loysir seg, tí vit hava fingið góðar 400.000 krónur burturúr, sigur Niels Jákup Thomsen.

Eisini Dagbókin hjá Onnu Frank, ein týðing eftir Fridu S. Johannessen, varð útseld.

- Bókin kom ikki út fyrr enn 18. des., men varð longu útseld tveir dagar seinni. Tað er fyrstu ferð, at vit uppliva, at ein slík bók selur so væl. Orsøkin er ivaleyst, at bókin er ógvuliga kend, nøgv hava lisið hana á donskum, men ein onnur orsøk er eisini, at upp undir jól í fjør vóru ikki so nógvar føroyskar bøkur at velja ímillum.

### Fyri framman

Týsdagin í næstu viku koma ikki færri enn tríggjar upprunaføroyskar bøkur í senn. Talan er um Í Geyma eftir Dánial Hoydal, Geislasteinar eftir Sólrun Michelsen og Margreta og mjólkin eftir Siggu Vang.

Geislasteinar er framhald av bókini Hin útvaldi. Ein ógvuliga spennandi og væl skrivað fantasysøga, sum Edvard Fuglø hevur myndprýtt. Í Geyma er ein rættiliga nógv øðrvísi barnabók, sum Hanni Bjartalíð hevur myndprýtt. Søgugongdin fer fram í hundanstíðini og høvuðspersónar eru nøvn, vit vanliga brúka sum tiltak, eitt nú Kúllur, Gellan, Roksimalena. Øll bókin spælir upp á orð og er skrivað í talumáli. Margreta og mjólkin er søgan um hvaðani mjólkin stavar. Bókin er ætlað teim smáu og er rættiliga ítøkilig. Bárður Oskarsson hevur myndprýtt. Í sambandi við hesar útgávurnar, verða myndir úr bókunum sýndar fram í Smiðjuni í Lítluvík týs- og mikudagin.

Bókadeildin hevur nøkur upprunaføroysk handrit liggjandi, sum væntandi verða givin út.

- Talið á upprunaføroyskum barnabókum liggur um fimm um árið. Flestu bøkurnar eru fantasybøkur. Nógvar spennandi bøkur eru komnar seinnu árini, men saknur er á barnabókum, sum lýsa Føroyar í dag, sigur Niels Jákup Thomsen.

Av øðrum útgávum, sum ikki eru barna- og ungdómsbøkur, kunnu vit nevna Veðrið í Føroyum í stórt hundrað ár eftir Petur Skeel Jacobsen, ið kemur í heyst. Teknisøga um Føroyingasøgu kemur væntandi út í summar. Mark Jiminez, sum er hálvur føroyingur og hevur búð í Føroyum, teknar. Danial Hoydal hevur tekstin til teknisøguna um hendi.

- Nevndin fyri forlagið hevur samtykt, at vit skulu geva fleiri léttlisnar bøkur úr. Vit kundu eisini hugsað okkum at givið fleiri uppruna føroyskar myndabøkur í litum út. Tær eru dýrar at gera, men sum støðan er í løtuni fer tað at bera til.

### Trygd

Stuðulin til Bókadeild Føroya Lærarafelags úr landskassanum tryggjar, at útgávuvirksemið er regluligt. Og ikki minst ein rættiliga stóran mentunarligan vinning.

- Stuðulin ger, at Bókadeildin kann virka sum eitt forlag, at fólk kunnu vera í starvi og at vit kunnu løna og samsýna fólki, sum arbeiða fyri forlagið, sum skriva, tekna og so framvegis. Fekk forlagið ikki stuðulin, vórðu útgávurnar tilvildarligar og óregluligar. Í dag setur eingin spurnartekin við, um vit skulu ella eiga at geva barnabøkur úr á føroyskum, men fyri bara fimtan árum síðani vóru rættiliga fáar barnabøkur á føroyskum. Eg haldi ikki, at Bókadeildin kann samanberast við hini forløgini. Eingin annar gevur barnabøkur út og lítlir pengar eru í útgávunum.

- Hinvegin kundu forløgini, sum eru serliga virkin, fingið ein stuðul á hvørjum ári, sum tryggjar, at fleiri bøkur koma út. Ein onnur loysn kundi verið, at ein serlig játtan er til útgávur, har forløgini kunnu søkja pengar. Tað er umráðandi, at pengar eru til at samsýna teimum, sum eiga ein lut í útgávunum, ikki minst teimum, sum skriva.

Niels Jákup Thomsen hevur vónir um, at betri virkiskor til høvundar og onnur listafólk, sum mentunarálitið leggur upp til, eisini fara at gagna barnabókaútgávu.

- Fáa høvundar og listafólk umstøður at arbeiða, ivist eg ikki í, at nógvar og góðar barnabøkur verða skrivaðar. Onnur lond leggja stóran dent á at týða teirra barnabøkur til onnur mál. Hetta verður eisini ein møguleiki hjá okkum sambært mentunarálitinum, sigur Niels Jákup Thomsen at enda í viðtali.